# Lýsing um ferðslu á Jóansøku 2005

1. Meðan kappróðurin fer fram, er øll óviðkomandi sigling á kappróðrarøkinum bannað. Somuleiðis er frá 1/2 tíma áðrenn kappróðurin byrjar og til hesin er av, øll ferðsla á keiøkinum og parkering har bannað.
2. Tá jóansøkan verður sett leygardagin 25. juni kl 14.00, og midnáttarsamkoman hildin kl 24.00, er niðari vegur stongdur fyri koyrandi ferðslu frá einum tíma áðrenn og til 1 tíma eftir tiltøkini.
3. Parkering er ikki loyvd á síðuvegunum frá gomlu Poshúsbrekkuni inn til Sjúkrahúsbrekkuna frá leygardegnum 25. juni kl 12.00 til mánamorgun kl 06.00
4. Parkeringsbann er í kirkjubrekkuni og á Sevmýrisvegnum leygardagin í tíðini frá kl 17.00 til kl. 21.00.
5. Súklukapping verður leygardagin 25. juni kl. 12.30 á vegastrekkinum frá Sjúkrahúsinum Ovari vegur, gjøgnum Øravíkarlíð til Tjaldavík og aftur. Í tí sambandi verður heitt á ferðsluna um at vísa ans.
6. Óviðkomandi sigling er ikki loyvd á fjørðinum sunnudagin 26. juni frá kl 14.00 til kl 16.00 frá Flakavirkinum inn til Bátahylin undir Tvørabakka í sambandi við svimjing og annað á fjørðinum.

Tvøroyrar kommuna

**Tvøroyrar býráð**

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 15. juli 2005, kl. 13.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir helvtina **matr. nr. 1145 aø, Tórshavn.**

Ognin er eini sethús, til støddar 97 m². Grundstykkið er uppá 527 m². Húsini eru liðugtbygd í 1997. Húsini eru partvíst betong og partvíst klødd við viði, og takt við taksteinum. Húsini eru í trimum forskotnum hæddum, loft, miðhædd og kjallari og innrættað soleiðis:

Kjallari: Eitt stórt rúm, kombinerað sovikamar og arbeiðsrúm, eitt stórt sovikamar afturat umframt eitt stórt grovrúm.

Miðhædd: Durur/kombinerað gongd. Grovkøkur. Køkur og spísi-stova í einum við altan. Í gongini er wc v/brúsu, hjúnakamar v/wc og brúsu og umframt eitt kamar.

Loft: Stova við brenniovni.

Sølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 311145, e-mail: ojk@jura.fo (j. nr. 20050156)**, sum kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssøluupstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya Fútarættur,
tann *16. juni 2005*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

### Býlingshúsið á Flat eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 15. september 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jensu Højgaard Andreassen, stovnsleiðara, tlf. 318371.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrsvegur 11, FO-188 Hoyvík í hendi í seinasta lagi hósdagin 7. juli 2005.



Á stovninum er ein vøggustova við 12 børnum og tvær barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari. Fýra starvsfólk eru í hvørjari stovu.

### Dagstovnin í Løkjatúni eftir:

- einum varaleiðara at arbeiða 35/40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi til barnagarðin at arbeiða 30/35 tímar um vikuna at byrja 1. august 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 30/35 tímar um vikuna at byrja 1. august 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einari køkshjálp at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 1. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini sum varaleiðari og pedagogur verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Starvið sum køkshjálp verður sett eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Charlottu á Váli, stovnsleiðara, tlf. 302390.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, FO-160 Argir, í hendi í seinasta lagi hósdagin 7. juli 2005.



Stovnurin er skipaður í eina vøggustovu og eina barnagarðsstovu, harumframt hýsir stovnurin børnum úr 1. flokki í Argja skúla.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

## Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

HÜNNEBECK

**Til keyps og leigu:**

- Fasadustillads
- Rullustillads
- Aluminiumstillads
- Forskallingar - Nógv sløg!
- Forskallingsútgerð: Forskallingsoljur, sproytur, klams, konus, avstandsrør, binditráður, bindimaksinur, fuguband, stoypibats/isolering, armeringsjarn o.a.



Leverandørurin til byggi-entreprenørvinnuna síðan 1970!

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

**www.sosialurin.fo**

# Lærlingur

Vit sóknast eftir einum røskum lærlingi at byrja sum skjótast.

Ein við SIT ella líknandi kann hava fyrimun.

Nærri fæst at vita við at ringja til okkara ella støkka inn á gólvið.

**Hógv Handilsvirki**
Oman á Sand 15
660 Søldafjørður
Tlf. 441963 ella 741963
hogv@hogv.fo

# Gomul hús á Hvítanesi

til sølu

**tel 58 40 64 ella (+45) 29 22 10 04**

# Hús í Trongisvági

Nýumvæld hús í Trongisvági til sølu um hóskandi boð fæst. Stovuhædd við køk og stovu í einum, baðirúm og vaskirúm. Á loftinum eru fýra kømur og baðirúm. Kjallarin óinnrættaður.

**Tlf. 372640**

tvis

køkar og bað



pf Klement Petersen

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60 · Fax 44 84 60 · klp@post.olivant.fo

Sosialurin 341800

# Bilførari søkist

Royndur bilførari við stóra koyrikortinum søkist sum skjótast.

**J. S. vørukoyring**
Tlf. 565656

# Íbúð til leigu

Í Hoyvvík, umleið 80 fermetrar, 3 kømur, køk/stova í einum, baðiverilsi og altan. Gott útsýni.

**Tlf. 517244**